Ár 2005, hin 29. mars

29. mars 2005 kl. 17.00 hevði Klaksvíkar Býráð býráðsfund við niðanfyri standandi fundarskrá.

John Mikkelsen møtti fyri Jóruna Høgnesen, sum er í farloyvi.

Allir limir møttir uttan Atli S. Justinussen.

19. Blái Krossur – "Børn í vanda"
Kunning um verkætlanina , Tórhild Bjarkhamar og Gestur Hovgård.

Sosiala nevnd samtykti at játta samsýning til limirnar í stýrisbólkinum, íalt kr. 20.000 í ár.

Peningurin verður tikin av játtanini til ungdómsvirksemi í 2005.

Fíggjarnevndin tekur undir við Sosialu nevnd 09.03.05 og leggur dent á, at samsýningarnar fyri fundirnar ikki fara upp um játtanina.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

20. Umsókn um byggiloyvi matr. 48o.
Søkt verður um byggiloyvi til sethús á matr. 48o. Umsøkta bygging er í 3. grundlendi. Byggingarstigið má ikki fara upp um 0,3 og nettobyggingarstigið má ikki fara upp um 0,4. Hetta viðførir, at byggingin krevur fráviksloyvi. Sí skriv frá T.U. sum mælir til at játta frávik út frá skrivinum og at byggisamtyktin verður broytt samb. hjálagda notati.

Tekniska nevnd tekur undir við tilmæli frá T.U. dagf. 03.03.05.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

21. Broyting av byggisamtykt á Skarðhamri.
Kærufreistin fyri broyting av ásetingunum fyri økispart B7 – ídnaðarøkið á Skarðhamri – var úti 28. des. 2004. Í kærutíðini komu inn 3 kærur, sum m.a. mótmæla, at lendi, íð skal verða til at velta, verður útlagt til ídnað. Orsøkin til broytingina í byggi-samtyktini er vantandi øki til ídnað, og eru hesi viðurskifti framvegis tey somu. Sí skriv og frágreiðing frá T.U. Málið verður sent Býráðnum til endaliga viðgerð og støðutakan.

Tekniska nevnd heldur fast við ætlanini og vísir kærunum aftur.

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við viðtøkuni hjá Teknisku nevnd 08.02.05, men mælir til, at nýggja ídnaðarøkið ikki fer suður um verandi ídnaðarøkið á Skarðhamri.

Býráðsins samtykt:
Samtykt at beina málið aftur í nevnd.

22. Nýggjur sløkkiliðsleiðari.
Málið um nýggjan sløkkiliðsleiðara hevur tikið drúgva tíð, síðani seinastu viðgerð í sept. 2004, er sett av til fulltíðar løn til sløkkiliðsleiðaran á fíggjarætlanini 2005. Í viðmerkingunum í málinum vísir T.U. á viðtøkur hjá Teknisku nevnd og Brunanevndini og upplýsir, at umsitingin ikki hevur lýst og ítøkiliggjørt málið meira, tí at hildið verður, at nývaldu býráðsnevndirnar skulu hava møguleika fyri at siga sína hugsan.. Eitt samstarv millum sløkkiliðið og Norðoya Bjargingarfelag er natúrligt, og viðlagt er álit fyri kommunala tilbúgving, har lagt verður upp til, at sløkkiliðsleiðarin skal samskipa lokalu tilbúgvingina á landi og sjógvi. Sí skriv og frágreiðing frá T.U.

Tekniska nevnd mælir til at lýsa eftir fulltíðar sløkkiliðsleiðara og at starvs- og lønarviðurskiftini verða lýst nærri. Samstundis verður umsitingin biðin um at koma við einum endurskoðaðum lista yvir økir, sum við fyrimuni kunnu leggjast undir økið hjá sløkkiliðnum.

Brunanevndin hevur viðgjørt málið um sløkkiliðsleiðaran av nýggjum og samtykt er at halda fast við viðtøkuna, dagf. 12.10.04, um fulltíðarstarv. Nevndin er samd um, at sløkkiliðs-leiðarastarvið er fulltíðarstarv, um

reglugerði skal haldast, tí talan er eisini um brunasaksviðgerð, tilbúgving í samband við Norðoyatunnilin og dálking og krevjandi viðlíkahaldsarbeiði av útgerð, bygningi og brandpostum. Tí verður staðiliga heitt á nevndir og býráð um at fáa starvið lýst leyst og sett sum skjótast

Á fundi í Teknisku nevnd tann 09.03.05 tekur nevndin undir við Brunanevndini 03.03.05 og Teknisku nevnd 08.02.05.

Fíggjarnevndin tekur undir við fyriliggjandi uppskoti, tó við nøkrum broytingum, sum tíðiliga og greitt tilskila, at tann, sum verður settur, má tola bygnaðarbroytingar, har fleiri uppgávur – eisini leiðandi uppgávur – kunnu verða lagdar afturat starvinum

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

23. Játtanir 2004 at seta í grunn.
Uppgerðin vísir íløgurnar frá 2004, ið ikki eru nýttar í árinum, men sum ætlanir nú eru um at flyta fram til 2005, og grunnarnir frá farnum árum, ið eru brúktir í 2004. Av tí at bókhaldi framvegis fær skjøl, sum viðvíkja 2004, so kunnu broytingar koma seinni. Hóast fleiri meta, at vit ikki eiga at flyta í grunn, so hava býráðslimir ynskt at halda fast við hesa mannagongd, tí á tann hátt missa deildirnar ikki játtaða peningin. Sí skriv frá býarverkfrøðinginum og roknskaparleiðaranum.

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við, at restpening-urin kr. 174.000 verður fluttur í grunn.

Tekniska nevnd tekur undir við tilmæli frá T.U. dagf. 08.03.05.

Havnanevndin tekur undir við tilmæli frá umsitingini, dagf. 08.03.05.

Mentanarnevndin tekur undir við tilmæli, dagf. 08.03.05.

Fíggjarnevndin tekur undir við Mentanarnevndini 09.03.05, Byggi- og býarskipanarnevndini 07.03.05, Teknisku nevnd 09.03.05 og Havnanevndini 09.03.05.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

23. Tryggja suðurendan á Kósabrúnni.
Tann 11. januar 2005 samtykti Havnanevndin at kanna møgu-leikan fyri at leingja spunsveggin sunnanfyri Kósabryggjuna nærri, við atliti til kyrruviðurskiftini. Síðani eru upplýsingar komnir frá LBF, at út frá aldukanningini hjá DHI kann við rímiligari vissu sigast, at avleiðingarnar verða lítlar. Sostatt skuldi verið møguligt at tikið støðu til um arbeiðast skal víðari við møguleikanum. Sí skriv og tilboðskostnað frá T.U.

Havnanevndin er positiv viðv. ætlanini og mælir til, at peningur verður avsettur á fíggjarætlanini 2006.

Fíggjarnevndin tekur undir við Havnanevndini 09.03.05

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

24. Ídnaðar- og góðshavnin í Ánunum – 5. byggistig.
Væntandi verður 4. byggistig av ídnaðar- og góðshavnini í Ánunum latið kommununi í juni 2005, og tí er stundin komin til fyrireiking av 5. byggistigi av verkætlanini. Eitt arbeiði, sum áður er kallað 6. byggistig er við í hesi uppgerðini, sum fevnir um at víðka havnaøkið niðan undir Ánavegin. Tá uml. helvtin av 5. byggistigið er framt, kann havnin takast í nýtslu, og tá alt byggistigi er framt er havnin í Ánunum liðug. Seinasta meting hjá ráðgevanum sigur, at 5. byggistig, íroknað víðkanina niðan undir Ánavegin og nýggjan atkomuveg, kostar uml. 12 til 13 mill. Vantandi játtan, um alt 5. byggistig skal fremjast í 2005, er 8. mill.kr. Sí meting og frágreiðing frá T.U.

Havnanevndin tekur undir við tilmæli frá T.U. dagf. 03.03.05 og mælir Fíggjarnevndini til at finna pengarnar, um neyðugt við útseting av øðrum íløgum ella við lántøku so arbeiðið kann fremjast skjótast tilber. Nevndin er samd um, at arbeiðast skal fyri umstøðum til at taka ímóri skipum skjótast tilber í ár.

Fíggjarnevndin tekur undir við Havnanevndini 09.03.05, samstundis sum spurningurin um fíggjing av hesi íløgum verður tikin upp á tann hátt, at allar ætlaðu íløgurnar í 2005 verða við-gjørdar av nýggjum og raðfestar.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

25. Val av limi og varalimi í nevndina fyri Tekniska Skúlan í Klaksvík.
Veljast skal 1 limur og 1 varalimur í nevndina fyri Tekniska skúlan í Klaksvík, 2005-08.

Býráðsins samtykt:
Steinbjørn O. Jacobsen valdur sum limur og
John Mikkelsen valdur sum varalimur.

26. Val av umboðum í skúlastýrini.
Veljast skulu 2 umboð fyri býráðið í skúlastýrið fyri Ósáskúlan og 2 umboð fyri býráðið í skúlastýrið fyri Ziskatrøðskúlan.

Býráðsins samtykt:
Málið tikið av skránni.

27. Viðv. Badmintonfelagnum – útseta freist.
Vísandi til skriv kommununnar 10.11.04 gongur freistin til tilsøgn um stuðul, út 1. mars 2005. Ymist er komið undir land hjá Badmintonfelagnum, men verður bíðað eftir svari frá m.a. Mentamálaráðnum. Tí verður mælt til at játta útseting av byggifreistini og tilsøgnini um stuðul.

Mentanarnevndin tekur undir við tilmæli frá umsitingini, dagf. 01.03.05.

Fíggjarnevndin tekur undir við Mentanarnevndini 09.03.05.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

28. Graviútgerð til smærri arbeiðir o.a. á vegadeildini.
Seinastu árini er arbeitt miðvíst við at dagføra maskinur og arbeiðsakfør hjá vegadeildini, og nú er stundin komin til smærri amboðini, sum fyri ein stóran part skulu brúkast til kommunal kloakkarbeiðir millum hús í eldru býlingunum. Sambært hesum koma maskinur, arbeiðsakfør og amboð hjá vegadeildini at síggja út, sum hjálagda yvirlit vísir. Sí skriv og uppgerð frá T.U.

Vísandi til omanfyri standandi uppgerð hevur vegadeildin og smiðjan mælt til nýútveganir, sum vístí málinum. T.U. tekur undir við tilmælinum og mælir til, at peningurin verður tikin av kontu 302980 "maskinkeyp", har kr. 500.000 eru tøkar.

Tekniska nevnd tekur undir við tilmæli frá T.U. dagf. 14.03.05.

Fíggjarnevndin tekur undir við Teknisku nevnd 16.03.05.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

29. Roknskapurin 2004, Serflutningsskipanin.
Sosiala nevnd hevur samtykt at góðkenna roknskapin.

Fíggjarnevndin mælir Býráðnum til at góðkenna grannskoðaða roknskapin fyri 2004.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

30. Roknskapurin 2004, Dagtilhaldið.
Sosiala nevnd hevur samtykt at góðkenna roknskapin.

Fíggjarnevndin mælir Býráðnum til at góðkenna grannskoðaða roknskapin fyri 2004, og tekur annars undir við tilmælinum frá umsitingini, dagf.02.03.05.

Býráðsins samtykt:
Tilmælið samtykt.

Fundurin lokin.